# ítróttur

Nr. 221 • hósdagur • 17. november 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


# So er klárt til HM



*Sveis megna›i ta›! Hóast li›i› fyri fyrstu fer› í hesi HM-undankappingini mátti lúta, so var 4-2 tapi› í Istanbul akkurát nóg miki› hjá Sveis, sum vann fyrra dystin 2-0*

*Mynd: Reuters*

**Mikukvøldið vórðu seinastu nøvnini funnin á fótbóltstjóðum, sum fara at vera við í lutakastinum í Leipzig fríggjadagin 9. desember. Millum tey 32 londini eru seks, sum ongan tíð áður hava roynt seg í HM-endaspælinum**

HM-ENDASPÆLIÐ
*Jóannes Hansen/Jákup Mørk*

Fríggjadagin 9. desember fer lutakast at vera í Leipzig í Týsklandi um, hvussu teir 32 luttakararnir í HM endaspælinum næsta summar skulu setast saman í átta innleiðandi bólkar. Tá fer eisini at verða greitt, hvat mótstøðuliðið fer at verða hjá týsku vertunum í fyrsta dystinum, sum er settur at vera 9. juni. Finalan verður í Berlin 9. juli.

Mikukvøldið varð navn sett á síðstu luttakararnar. Undan undankappingini var tað greitt, at Týskland fór at luttaka. Týskland verður við, tí týskarar fara at hýsa endaspælinum. Í øllum undanfarnu HM endaspølunum hevur heimsmeistarin frá undanfarnu kappingini verið sjálvskrivaður luttakari. Heimsmeistarin hevur ikki luttikið í undankappingunum.

Soleiðis hevur tað ikki verið hesa ferð. Men Brasilia, sum var best í endaspælinum, sum í 2002 var í Japan og Suðurkorea, hevur spælt seg í endaspælið í Týsklandi.

Seks av teimum 32, sum fara at luttaka í HM endaspælinum í Týsklandi næsta summar, hava ikki áður verið við í endaspølum. Talan er um Ukreina, Trinidad/Tobago, Togo, Fílabeinsstrondin, Angola og Ghana.

Australia fer at taka lut fyri aðru ferð. Fyrra ferðin, at Australia royndi seg í HM endaspæli, var í 1974, tá ið kappingin var í Vesturtýsklandi.

**Sveis tapti - menn vann**

Sæð við føroyskum eygum var kanska serliga spennandi at vita, hvussu leikur fór, tá Sveis vitjaði í Turkalandi. Sveis, sum var í okkara undankappingarbólki, hevði enn til góðar at tapa dyst í undankappingini, og við einum 2-0 sigri á heimavølli skaptu teir sær eitt framúr útgangsstøði undan trupla dystinum í Istanbul.

Og eftir bara einum minutti stóð uppaftur betur til hjá alpulandinum. Alexander Frei, sum føroyska landsliðið neyvan gloymir í bræði, fekk mest sum alt fyri eitt møguleikan av brotsteigarblettinum, og hann var ósvikaliga tryggum úr ellivu metrum.

Men turkar góvust tó ikki. Seinastu 89 minuttirnar gjørdist talan um eitt langt álop, og spenningurin gjørdist eisini øgiligur. Eftir 52 minuttum hevði Turkaland vunnið seg upp á 3-1, og so skuldi bara eitt mál til, áðrenn teir vóru á odda. Sveis minkaði tó aftur um munin, men tá Sanli í seinasta minuttinum av vanligu leiktíðini økti til 4-2, gjørdist talan um eina seinastu desperatu roynd. Tveir minuttir vóru farnir av yvirtíðini, tá turkar fingu gyltan møguleika við frísparki úr 18 metrum, men skotið brast í manngarðin, og nærri enn tí sama komu turkar ikki. Teir vunnu dystin, men tað vóru spælararnir hjá Sveis, sum fegnaðust, tá dysturin var av.

Aðrastaðni í Europa eydnaðist sum væntað Spania og Kekkia at koma víðari. Spania hevði trivaliga 5-1 leiðslu at dúva uppá, og tí var 1-1 á útivølli móti Slovakia ríkiligt hjá teimum. Kekkia vann í Noreg 1-0 leygardagin, og mikukvøldið var úrslitið aftur tað sama - hesa ferð við Rosicky sum málskjútta.

Teir 32 luttakararnir, sum fríggjadagin 9. desember skulu flokkast í átta bólkar, eru hesir:

**Europa:** Týskland (vertur), Ukreina, Holland, Ongland, Pólland, Kroatia, Italia, Portugal, Svøríki, Serbia/Montenegro, Frakland, Sveis, Kekkia og Spania.

**Suðuramerika:** Argentina, Brasilia, Ecuador og Paraguay.

**Asia:** Japan, Saudi-Arabia, Iran og Suðurkorea.

**Norður- og Millumamerika:** USA, Meksiko, Costa Rica og Trinidad/Tobago.

**Afrika:** Angola, Togo, Fílabeinsstrondin, Ghana og Tunesia.

**Oceania:** Australia.

## Høgni Højgaard vann jubileumskapping

BILLARD
*Tíðindaskriv*



*Høgni Højgaard vann um vikuskiftið stóru jubileumskappingina hjá Billardsambandinum*

Leygardagin varð finaluumfarið í 25 ára jubileumskappingini hjá Billardsambandi Føroya spælt í Havn. Úrslitið gjørdist, at Høgni Højgaard úr Havnar Klubba vann kappingina. Nr. 2 varð Njál Petersen úr Klaksvíkar Billardfelag og nr. 3 Max Rasmussen úr Tvøroyrar Billardfelag. Kappingin varð skipað sum handicapkapping. Undan finaluumfarinum hevði verið kvalifiseringskapping í fýra av billardfeløgunum kring landið.

## Kaggin kanónsigur móti Klubba

BILLARD
*Tíðindaskriv*

1. deildarliðið hjá Kagganum tók nú um dagarnar føroyameistaraliðið úr Havnar Klubba á bóli og vann rætt og slætt tað ein kann kalla kanónsigur. Kaggin vann ikki minni enn 18-0 á liðnum hjá Havnar Klubba, sum vann FM heitið seinasta kappingarár. Manningin á Kaggaliðnum var Bjarni Skaalum, Jan Müller og Steinbjørn í Dali. Klubbaliðið var mannað við Henrik Pedersen, Niels Nielsen og Carsten Hansen.

Einki vildi hjá Klubbamonnum á borðinum hjá Kagganum. Henrik, sum fyri stuttum vann Haldor Holm Cup, fekk ongantíð spælið at koyra, tó at hann tapti tepurt tveir av dystunum. Bjarni Skaalum var bestur við 24,57 eygum í meðal, meðan Jan Muller gjørdist næstbestur við 22,20 eygum í meðal. Kaggin endaði við tilsamans 21,28 eygum í meðal, meðan Havnar Klubbi hevði 17,30 eygu. Henrik hevði besta umfarið uppá 128 eygu.

Tað er greitt, at við hesum sigrinum hevur Kaggin fingið eina sera góða byrjan, men tað eru tilsamans seks umfør í kappingini, so nøgv kann henda.

## Kaggin 2. deild ruddaði borðið

BILLARD
*Tíðindaskriv*

Ikki bert í 1. deild hevur Kaggin havt eydnuna við sær. Eftir at Kaggin í 1. deild vann 18-0 á Havnar Klubba herfyri, endurtók 2. deildarliðið hjá Kagganum sama sigur móti Tvøroyrar Billardfelag við at vinna 18-0. Heimir Ottoson var bestur við 12,80 eygum í meðal, meðan Jens Pauli Petersen eisini frá Kagganum gjørdist næstbestur við 11,40 eygum í meðal. Triði maður á Kaggaliðnum var Fríðbjartur Reinert við 8,53 eygum í meðal. Teir, ið mannaðu liðið hjá Tvøroyrar Billardfelag, vóru Rókur Dimon, Páll Heri Nolsøe og Jan Egil Johannesen. Bestur av teimum var Páll við 8 eygum í meðal. Jens Pauli hevði besta umfarið, 124 eygu.

**Støðan í 2. deild:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Havnar Klubbi | 32 stig |
| 2 | Billardfelag Kaggans | 26 stig |
| 3 | Vágs Billardfelag | 20 stig |
| 4 | Klaksvíkar Billardfelag | 8 stig |
| 5 | Tvøroyrar Billardfelag | 4 stig |